# Kostnaðarroknskapur fyri ÁKK og ÁKP fyri 2024

# Inngangur

Endamálið við at gera kostnaðarroknskapin, herundir uppgerðina fyri ÁKK og ÁKP er, at kundarnir kunnu síggja egnu samlaðu kostnaðirnar íroknað óbeinleiðis íløgukostnaðir, sum eru tiknir frá avkastinum áðrenn avkastið er tilskrivað eftirlønaruppsparingini. ÁKK og ÁKP uppgerðin hjá einstaka kundanum sæst í eftirlønaryvirlitinum á kundaportalinum "Mítt LÍV".

- ÁKK eru samlaðu árligu kostnaðirnir uppgjørdir í krónum. Uppgerðin inniheldur allar innanhýsis og uttanhýsis kostnaðir, herundir allar óbeinleiðis kostnaðir.
- ÁKP eru samlaðu árligu kostnaðirnir uppgjørdir í prosentum. Lyklatalið er útroknað við at býta ÁKK hjá einstaka kundanum við samlaðu uppsparingini hjá kundanum við ársenda.

ÁKP hjá einstaka kundanum er útroknað sum lutfallið millum kundans ÁKK og kundans ultimo depot (umframt møgulig óbýtt kundaogn/reservir). Tað er tó tikin hædd fyri, at kundans ultimo depot kann stava frá bæði skattaðum og óskattaðum inngjaldi. Í sambandi við útrokningarnar eru brúktar útrokningarfortreytir, sum eru eins fyri allar kundar. Fortreytirnar royna at endurspegla faktisku viðurskiftini, men tað kann ikki gerast fult út og tí kunnu munir verða í, hvussu neyvt ÁKP endurspeglar kostnaðarprosentið hjá einstaka kundanum.

# Nýttur háttur fyri uppgerð av ÁKK og ÁKP

## Váðarenting

Flestu kundarnir hjá felagnum hava teknað eina ella fleiri tryggingar (út yvir sjálva eftirlønaruppsparingina). Fyri hesar tryggingar fær eginognin tillutað part av hesum gjaldi sum gjald til eginognina fyri at átaka sær ein váða. Hetta er tað, sum er anmeldað til Tryggingareftirlitið sum eginkapitalforrentningur. Hesi gjøld verða goldin av einstaka kundanum í tann mun einstaki kundin hevur hesar tryggingar.

Fyri neyvari lýsing verður víst til eginkapitalforrentningin hjá felagnum. Víst verður somuleiðis til punkt 13 í avstemmingartalvuni niðanfyri.

## Íløgukostnaður

Størsti kostnaðurin, sum er við í uppgerðini yvir ÁKK og ÁKP, eru kostnaðir knýttir at íløguvirkseminum hjá felagnum.

Íløgukostnaðurin er tengdur at:

- Hvørjar íløgubólkar felagið hevur gjørt íløgur í og
- Um talan er um aktiva ella passiva íløgurøkt.

Íløguætlanin hjá P/F Tryggingarfelagið LÍV er at skapa eitt so høgt langskygt risikojusterað avkast eftir kostnað sum gjørligt (uttan at taka óneyðugan váða).

Íløgurnar eru í stóran mun gjørdar ígjøgnum eina íløguætlan við aktivum íløgum við einum høgum væntaðum avkasti í mun til eina passiva íløguætlan.

Í íløgutilgongdini roynir felagið at fáa so góðar og kappingarførar treytir sum gjørligt, soleiðis at bæði avkast og íløgukostnaðir eru so kappingarfør sum møguligt. Møguligur avsláttur í íløgukostnaðinum verður latin kundunum.

## Ikki viðkomandi avtalur

Í vegleiðingini fyri uppgerðina av ÁKK og ÁKP er ásett, at ein partur at tryggingunum ikki skal teljast við í uppgerðini fyri ÁKK og ÁKP. Talan er um tær tryggingaravtalur, sum bert umfata váðistryggingar (tað eru reinar samlagstryggingar) og ikki hava eina eftirløn knýtta til váðistryggingini. Einkultar tryggingar í miðalrentu og marknaðarrentu hava bert váðistryggingar og koma hesar somuleiðis undir at vera ikki viðkomandi avtalur.

Felagið hevur eyðmerkt hesar tryggingar. Kostnaðirnir til hesar tryggingarnar verða býttir á sama hátt sum restin av tryggingunum. Til endans verða kostnaðirnir knýttir at hesum tryggingum tiknir úr uppgerðini og lagdir í teigin "Ikki viðkomandi avtalur" í avstemmingartalvuni. Felagið hevur á henda hátt býtt part av rakstrarkostnaði, váðiskostnaði og íløgukostnaði til hesar tryggingar. Hesir kostnaðir eru ikki við í uppgerðini av ÁKK og ÁKP.

Ikki viðkomandi avtalur síggjast í avstemmingartalvuni niðanfyri.

## Nýttur háttur fyri ymsar kostnaðarlutir

Niðanfyri er ein yvirskipað frágreiðing av framferðarháttinum í sambandi við uppgerðini av ÁKK og ÁKP fyri kundarnar hjá P/F Tryggingarfelagnum LÍV. Kostnaðaruppgerðin fyri ÁKK og ÁKP er gjørd út frá ásetingunum í "Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser, dateret 15. september 2023." (ÁKP-avtalan).

Felags fyri allar kostnaðarlutirnar er, at hædd verður tikin fyri, hvussu stóran part av árinum kundin hevur havt tryggingar í felagnum. Harafturat verða kostnaðirnir bert býttir út á kundarnar innanfyri bólkarnar, tvs. at kostnaðirnir fyri marknaðarrentu verða bert býttir út á marknaðarrentutryggingarnar og so framvegis.

| Kostnaðarlutur: | Metoda/Kelda: | Býtislykil/viðmerking: | Postur í avstemmingartalvuni |
|---|---|---|---|
| **Rakstrarkostnaðir:** | | | |
| Beinleiðis rakstrarkostnaðir | Kostnaðurin í hesum posti svarar til rakstrarkostnaðin í roknskapinum.<br><br>**Serlig viðurskifti:**<br>Fyri 2024 er tað galdandi, at býti av posti 2 "Umsitingar- og nýtekningarkostnaðir sbr. rakstrarroknskapinum" er merkt av serligum viðurskiftum. Miðalrentutryggingar (GR) hava í 2024 fingið eina samsýning frá Marknaðarrentutryggingum (MR) áljóðandi 5,7 m.kr. fyri tíðarskeiðið 1.12.2012 til 31.12.2024. Hetta merkir býtið av umsitingarkostnaði millum MR og GR, og við hesi javning verða umsitingarkostnaðirnir fyri 2024 positivir (inntøka) fyri GR og "ikki viðkomandi avtalur" og samsvarandi hægri fyri MR. | Fyri marknaðarrentu og miðalrentu: Kostnaðirnir verða trektir beinleiðis frá depotinum hjá tí einkulta kundanum. Fasta árliga gjaldið verður trekt árliga, meðan prosentið av inngjaldinum verður trekt mánaðarliga, tá inngjøldini koma inn.<br><br>Fyri samlagstryggingar: Kostnaðirnir verða býttir javnt út á kundarnar innan fyri samlagstryggingaravtalunum.<br><br>Fyri eginognina: Rakstrarkostnaðirnir fyri eginognina verða lagdir undir miðalrentu, og mótroknaðir í posti 8 í avstemmingartalvuni. Hesir kostnaðir verða tí ikki býttir út á kundarnar. | 2 |
| Kostnaðarundirskot fyri rakstrarkostnað, sum verður dekkað av eginognini (miðalrenta og samlagstrygging) | Í tøkniliga grundarlagnum er ásett hvørjir rakstrarkostnaðir eru knýttir at ymisku produktunum. Fyri miðalrentu liggja hesir kostnaðir inni í kjarnuskipanini og verða drignir frá depotinum hjá kundanum, antin sum eitt fast árligt gjald ella sum eitt prosent av inngjaldinum ella sum ein blandingur av báðum. Fyri samlagstrygging verður eitt avtalað umsitingargjald trekt frá hvørjari avtalu.<br><br>Tað kostar meir at reka miðalrentu- og samlagstryggingar enn tað verður trekt frá kundunum. Hetta kostnaðarundirskotið skal eginognin gjalda. Hesir kostnaðir verða trektir frá rakstrarkostnaðunum í posti 2 og upplýstir í posti 8.<br>Í 2024 vóru kostnaðir fluttir frá marknaðarrentu til miðalrentu fyri umsiting av rakstrarkostnaðum hjá tryggingum undir útgjaldi frá 1.1.2012-31.12.2024. Hetta gevur eitt kostnaðaryvirskot í 2024, og fær eginognin yvirskotið. | Hesir kostnaðir verða trektir frá rakstrarkostnaðunum fyri miðalrentu og samlagstrygging, sum eru upplýstir í posti 2 í avstemmingartalvuni.<br><br>Rakstrarkostnaðirnir hjá eginognini verða somuleiðis mótroknaðir frá posti 2 í hesum posti.<br><br>Samlaða talið svarar til kostnaðirnar sum eru trektir frá kundunum. | 8 |
| Kostnaðarúrslit (marknaðarrenta) | Í tøkniliga grundarlagnum er ásett hvørjir rakstrarkostnaðir eru knýttir at ymisku produktunum. Fyri marknaðarrentu liggja hesir kostnaðir inni í kjarnuskipanini og verða drignir frá depotinum hjá kundanum, antin sum eitt fast árligt gjald ella sum eitt prosent av inngjaldinum ella sum ein blandingur av báðum.<br><br>Er meir ella minni rakstrarkostnaður trektur frá kundunum enn brúkt verður, verður munurin lagdur í kostnaðarúrslitið. | | 15 |
| Umsitingarkostnaðir hjá uttanhýsis veitarum av tryggingartænastum | Felagið hevur samstarv við Gjensidige um viðgerðartryggingar. Hesar verða upplýstar av felagnum. | Kostnaðurin er ikki knýttur at nakrari uppsparing, og hoyrir til ikki viðkomandi avtalur. Kostnaðurin verður tí ikki býttur millum kundarnar. | 6 |
| **Váðiskostnaður:** | | | |
| Váðarenting av eginognini | Í anmeldaða eginkapitals-forrentningini er ásett hvat eginognin skal hava fyri tikna váðan. Eginognin fær eitt váðisgjald frá hesum økjum: Gjald fyri operationellan váða, gjald av váðisgjaldinum fyri GR tryggingar og gjald fyri LÍVkonto. | Váðarentingin verður býtt millum kundarnar í mun til ultimo depotið. Tó verður gjaldið fyri LÍVkonto trekt frá depotinum saman við rakstrarkostnaðunum í kjarnuskipanini. | 13 |
| Váðarenting av ábyrgdarpeningi (eginogn) | Ikki aktuelt fyri felagið | | |
| **Garantigjald (marknaðarrenta):** | | | |
| Garantigjald (marknaðarrenta) | Ikki aktuelt fyri felagið | | |

| Kostnaðarlutur: | Metoda/Kelda: | Býtislykil/viðmerking: | Postur í avstem-mingar-talvuni |
|---|---|---|---|
| **Íløgukostnaður:** | | | |
| Innanhýsis íløgukostnaðir (marknaðarrenta) | Í hesum posti liggja innanhýsis íløgukostnaðir, sum felagið hevur gjørt eina ítøkiliga meting av í samband við roknskapin. Síðani verða hesir kostnaðir býttir millum ymisku íløgubólkarnar, sum felag hevur (íløgubólk 1 – 10) í tí lutfalli hesir hava. Kostnaðurin upplýstur í hesum posti svarar til íløgukostnaðin upplýstur í roknskapinum.<br><br>Íløgukostnaðirnir fyri eginogninga, sum er upplýstur í roknskapinum, verður lagdur undir posti 9 fyri marknaðarrentu og miðalrentu, býtt eftir goymsluni ultimo árið. Kostnaðurin verður mótroknaður í posti 12, og verður tí ikki býttur út á kundarnar. | Íløgukostnaðirnir verða fyri marknaðarrentu býttir millum ymisku íløgubólkarnar, sum felag hevur (íløgubólk 1 – 10) í tí lutfalli hesir hava, og síðani býttir út á marknaðarrentukundarnar eftir íløgusamanseting kundans ultimo árið.<br><br>Íløgukostnaðurin fyri eginognina verður mótroknaður í posti 12, og verður tí ikki býttur út á kundarnar. | 9 |
| Beinleiðis íløgukostnaðir (marknaðarrenta) | Íløgukostnaðurin verður útroknaður eftir kick back frá íløgurøktaranum. Kick back verður tilskrivað eigaranum av íløgunum í yvirskipaðu íløgubólkunum (Marknaðarrentubólkinum). Í hesum kostnaðum eru allir faktiskir kostnaðir, sum verða trektir frá áðrenn avkastið verður tilskrivað felagnum. Kostnaðirnir verða givnir av íløguavtaluni ella íløgufondunum. Hetta eru m.a. kostnaðir fyri íløgurøkt, depotkostnaðir, transaktiónskostnaðir niðri í íløgunum. | Hesir kostnaðir verða býttir millum ymisku íløgubólkarnar, sum felagið hevur (íløgubólk 1 – 10) í tí lutfalli hesir hava, og síðani býttir út á marknaðarrrentukundarnar eftir íløgusamanseting kundans ultimo árið. | 10 |
| Óbeinleiðis íløgukostnaðir (marknaðarrenta) | Í hesum posti liggja óbeinleiðis íløgukostnaðir, sum eru roknaðir við brúk av "branchens fælles beregningssatser". Hetta eru kostnaðir fyri m.a. íløgurøkt, depotkostnaðir, transaktiónskostnaðir niðri í íløgunum. Sambært vegleiðingini "LP-information 3/23" broti 6.4.1, sum ífylgi ÁKP-avtaluni skal fylgjast, skulu íløgukostnaðir niðri í fondum fyrst og fremst verða roknaðir við brúk av "branchens fælles beregningssatser". Kemur ein íløga ikki undir definitiónina av nøkrum av "branchens fælles beregningssatser" verður faktiski kostnaðurin nýttur, og verður hann funnin undir beinleiðis íløgukostnaðir. | Hesir kostnaðir verða býttir millum ymisku íløgubólkarnar, sum felagið hevur (íløgubólk 1 – 10) í tí lutfalli hesir hava, og síðani býttir út á marknaðarrrentukundarnar eftir íløgusamanseting kundans ultimo árið. | 10 |
| Íløgukostnaður goldin av eginognini (samlagstrygging) | Kostnaður, sum er knýttur at íløgum í samlagstrygging, verður goldin av eginognini og ikki býttur út til kundarnar. Íløgukostnaðurin verður mótroknaður í hesum posti. | Kostnaðurin verður mótroknaður frá posti 9 í avstemmingartalvuni í hesum posti, og verður ikki býttur út á kundarnar. | 11 |
| Íløgukostnaðir til eginognina | Kostnaðurin, sum er knýttur at íløgum hjá eginognini er ikki býttur til kundarnar. Kostnaðurin er býttur millum marknaðarrentu og miðalrentu eftir støðd av goymslu ultimo árið. | Íløgukostnaðir til eginognina verða mótroknaðir frá innanhýsis íløgukostnaðunum (post 9) fyri marknaðarrentu og miðalrentu hesum posti. Kostnaðirnir verða tí ikki býttir út á kundarnar. | 12 |
| Innanhýsis íløgukostnaðir (miðalrenta) | Í hesum posti liggja innanhýsis íløgukostnaðir, sum felagið hevur gjørt eina ítøkiliga meting av í samband við roknskapin. Kostnaðurin upplýstur í hesum posti svarar til íløgukostnaðin fyri miðalrentu og samlagstrygging, sum er upplýstur í roknskapinum. | Fyri miðalrentu verða íløgukostnaðirnir býttir millum kundarnar út frá ultimo depotinum hjá kundunum.<br><br>Íløgukostnaðurin fyri samlagstrygging verður goldin av eginognini. Kostnaðurin verður mótroknaður í posti 11 í avstemmingartalvuni, og ikki býttur út á kundarnar. | 9 |
| Beinleiðis íløgukostnaðir (miðalrenta) | Íløgukostnaðurin verður útroknaður eftir kick back frá íløguróktaranum, tí hetta verður tilskrivað eigaranum av íløgunum í einstaka íløgufondinum. Í hesum kostnaðum eru allir faktiskir kostnaðir, sum verða trektir frá áðrenn avkastið verður tilskrivað felagnum. Kostnaðirnir verða givnir av íløguavtaluni ella íløgufondunum. Hetta eru kostnaðir fyri m.a. íløgurøkt, depotkostnaðir, transaktiónskostnaðir niðri í íløgunum. | Íløgukostnaðirnir verða býttir millum kundarnar út frá ultimo depotinum hjá viðskiftafólkunum.<br><br>Íløgukostnaðurin fyri samlagstrygging verður goldin av eginognini. Kostnaðurin verður mótroknaður í posti 11 í avstemmingartalvuni, og ikki býttur út á kundarnar. | 10 |
| Óbeinleiðis íløgukostnaðir (miðalrenta) | Miðalrenta hevur ongan óbeinleiðis íløgukostnað | | 10 |
| Íløgukostnaðir í dóttirfeløgum | Kostnaðurin knýttur at dóttirfeløgum liggur sambært bilag 7 í LP information 3/23 undir rakstrarútreiðslur, og skal tí ikki roknast við í ÁKK hjá felagnum. | | |
| Leiga | Felagið uppgerð eina roknaða leigu av egnum høvuðssæti. Roknaða leigan er ikki faktiski kostnaðurin av leiguni. Roknaða leigan verður prístalsregulera við 2% p.a. og verður býtt millum marknaðarrentu og miðalrentu eftir av nevndini góðkendum býtislykli. | Hendan roknaða leigan verður býtt javnt út á kundarnar í marknaðarrentu og miðalrentu, har hædd tó verður tikin fyri, hvussu stóran part av árinum kundin hevur havt tryggingar í felagnum. | 3 |
| **Tryggingarmiðlarar:** | | | |
| Tryggingarmiðlarar | Har felagið ella viðskiftafólk felagsins brúka miðlarar eru viðkomandi kostnaðirnir fyri felagið tiknir við. | Kostnaðurin hoyrir til ikki viðkomandi avtalur og verður tí ikki býttur millum kundarnar. | 4 |

Í talvuni niðanfyri er upplýst, hvussu stórur partur av teimum samlaðu íløgukostnaðunum (Íløgukostnaðir) og teimum samlaðu kostnaðunum (ÁKK), sum eru uppgjørdir við útgangsstøði í standard útrokningarsatsum fyri vinnuna (branchens fælles beregningssatser).

| Branchens fælles beregningssatser | Íløgukostnaðir | ÁKK |
|---|---|---|
| Lutfall | 24% | 15% |

## Lýsing av posti 1b-1c í avstemmingartalvuni

| Lýsing | Metoda/Kelda: | Býtislykil/viðmerking: | Postur í avstemmingar- talvuni |
|---|---|---|---|
| ÁKK upplýst til kundarnar | | | 1 |
| Samlaði kostnaðurin upplýstur til kundarnar | Her verður upplýst samlaði kostnaðurin sum verður upplýstur til kundarnar á kundaportalinum | | 1a |
| Samlaði kostnaðurin knýttur at kundum, sum antin eru farnir úr felagnum, ella har eftirlønarskjalið er skrásett sum endað | Her verður upplýst samlaði kostnaðurin fyri tryggingar sum eru lukkaðar áðrenn 1.1.2025 ella tryggingar knýttir at kundum, sum eru deyðir áðrenn 1.1.2025. | | 1b |
| Samlaði kostnaðurin fyri avtalur, har ÁKK ikki er viðkomandi | Her verður samlaði kostnaðurin fyri tryggingar sum bert hava váða og onga tilknýtta uppsparing upplýstur. Størsti partur av hesum tyrggingum eru samlagstryggingar, men nakrar einkulttryggingar í marknaðarrentu og miðalrentu eru eisini í hesum posti. Harafturat eru kostnaðirnir knýttir at viðgerðartrygd eisini upplýstir í hesum posti. | | 1c |
| Samlaði kostnaðurin fyri kundar, sum enn ikki hava fingið upplýst ÁKK | Her verður samlaði kostnaðurin fyri kundar, sum ikki fáa upplýst teirra kostnað fyri ávísar tryggingar í ár. Kostnaðirnir til hesar tryggingar eru býttir út á kundarnar á sama hátt sum fyri allar aðrar tryggingar. Kostnaðirnir verða ikki vístir vegna støðd á depoti. Talan er um tryggingar sum antin hava eitt samlað depot fyri kundan sum er minni enn 100 DKK ella hendingar í árinum gera at ÁKP fyri kundan ikki vísir eina rættvísa mynd. | Arbeitt verður fram í móti at allar tryggingar fáa kunnað teirra ÁKK. | 1d |

## Útrokning av ÁKP

Uppsparingini hjá kundunum kann býtast upp í ávikavist óskattaðar og skattaðar uppsparingar:

A. Kundauppsparing ultimo, óskattað
B. Kundauppsparing ultimo, skattað
C. Kundauppsparing ultimo, tilsamans
D. A + B/0,6: Kundauppsparing tilsamans, har skattað uppsparing er umroknað til eitt mett óskattað støði

*Býti av kostnaðum hjá kundum*
ÁKK til hvønn kunda verður deild upp í kostnaðir, sum eru ávikavisk skiftandi (variablir) og ikki skiftandi í mun til støddina á uppsparingini:

E. Skiftandi kostnaðir (svarandi til tann part, sum hvør einstakur kundi hevur av samanteljingini av posti 9 til 12 + tann skiftandi partin av posti 17 í avstemmingartalvuni)
F. Ikki-skiftandi kostnaðir (svarandi til tann part, sum hvør einstakur kundi hevur av samanteljingini av posti 2 til 8 og 13 til 16 + tann ikki-skiftandi partin av posti 17 í avstemmingartalvuni).

*Útrokning av ÁKP*

ÁKP verður roknað soleiðis:
E / C + F / D

ÁKP verður roknað sum kundans skiftandi kostnaðir (E) býtt við kundans uppsparing (C) pluss kundans ikki-skiftandi kostnaðir (F) býtt við kundans uppsparing, har skattað uppsparing er umroknað til eitt mett óskattað støði (D).

ÁKP hjá hvørjum einstøkum kunda er roknað sum lutfallið millum ÁKK hjá kundanum og uppsparingina ultimo hjá kundanum (+ tann partin av møguligum ikki býttum avsetingum, sum kundin eigur) tó soleiðis, at hædd verður tikin fyri, at ultimo uppsparingin hjá einum kunda kann stava frá bæði skattaðum og óskattaðum inngjøldum. Í hesi útrokning eru nakrar metingar gjørdar, sum eru eins fyri allar kundar og fyri øll eftirlønarfeløg og -grunnar. Hesar metingar eru ein roynd at vísa veruligu viðurskiftini, men hetta kann ikki gerast til fulnar, og tí kunnu munir vera millum, hvussu neyvt ÁKP lýsir kostnaðarprosentið hjá hvørjum einstøkum kunda.

# Avstemmingartalva

| Nr. | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1a | Summur av ÁKK upplýst kundunum (limunum) | | | | 56.646.628 |
| 1b | Summur av ÁKK býtt út á kundar (limir), sum antin eru farnir úr felagnum (grunninum), ella har eftirlønarskjalið er skrásett sum endað | | | | 762.123 |
| 1c | Summur av ÁKK fyri avtalur, har ÁKK ikki er viðkomandi | | | | 1.199.890 |
| 1d | Summur av ÁKK, sum enn ikki er upplýst | | | | 720.396 |
| **1** | **Summur av ÁKK til kundarnar (limirnar)** | | | | **59.329.037** |

| Nr. | Kostnaðarpostur | Miðal-renta | Marknaðar-renta | Ikki viðkomandi avtalur | Samanlagt |
|---|---|---|---|---|---|
| 2 | Umsitingar- og nýtekningarkostnaðir, sbr. rakstraroknskapinum | -1.564.990 | 18.864.168 | -569.366 | 16.729.812 |
| 3 | Leiga av egnum skrivstovubygningi | 53.191 | 703.048 | 10.674 | 766.912 |
| 4 | Kostnaðir til tryggingarmiðlarar | 0 | 0 | 95.000 | 95.000 |
| 5 | Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi í dótturfeløgum | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 6 | Umsitingarkostnaðir hjá uttanhýsis veitarum av tryggingartænastum | 0 | 0 | 359.488 | 359.488 |
| 7 | Umsitingar- og nýtekningarkostnaðir viðvíkjandi SVL-tryggingum, sbr. rakstraroknskapinum | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 8 | Yvir-/undirskot av umsitingar- og nýtekningarkostnaðum, sum fellur til kjarnufæfeingi (mótrokningarpostur) | 3.898.938 | 0 | 1.286.809 | 5.185.747 |
| 9 | Íløgukostnaðir, sbr. rakstraroknskapinum | 753.118 | 14.761.257 | 72.714 | 15.587.090 |
| 10 | Aðrir íløgukostnaðir í grunnum, dótturfeløgum, íløgufeløgum o.ø. | 209.098 | 21.819.051 | 28.470 | 22.056.618 |
| 11 | Yvir-/undirskot av íløgukostnaðum, sum fellur til kjarnufæfeingi (mótrokningarpostur) | -362.427 | 0 | -82.338 | -444.766 |
| 12 | Íløgukostnaðir, sum hoyra til kjarnufæfeingi (mótrokningarpostur) | -31.772 | -545.945 | -971 | -578.688 |
| 13 | Váðarenting, íroknað javning av skuggakontum | 0 | 3.432.428 | 58 | 3.432.486 |
| 14 | Gjøld fyri trygdir | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 15 | Kostnaðarúrslit | 0 | -3.860.015 | -646 | -3.860.662 |
| 16 | Aðrir kostnaðir, sum kunnu útgreinast | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 17 | Javning av kostnaðum fyri undanfarin ár | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **18** | **Tilsamans** | **2.955.157** | **55.173.991** | **1.199.890** | **59.329.037** |
| | | | | | 0 |
| **19** | **Postur 1 minus 18** | | | | **0** |

Viðvíkjandi "Ikki viðkomandi avtalum" verður víst til umrøðu í "Nýttur háttur fyri uppgerð av ÁKK og ÁKP" omanfyri. Viðvíkjandi posti 1d verður víst til umrøðu í "Nýttur háttur fyri uppgerð av ÁKK og ÁKP" í talvuni "Lýsing av posti 1b-1c í avstemmingartalvuni".

# Váttan frá P/F Tryggingarfelagnum LÍV

Felagið hevur dags dato lagt fram kostnaðarroknskapin, sum fevnir um "nýttan hátt" fyri uppgerð og "avstemmingartalvu" fyri roknskaparárið 2024.

Tað er okkara fatan, at "nýttur háttur" og "avstemmingartalvan" eru gjørd í samsvari við "Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser", dagfest 15. september 2023.

Tað er somuleiðis okkara fatan, at útrokningin av ÁKK og ÁKP og tey val av uppgerðarhættum, sum greitt er frá í "nýttum hátti", eru í samsvari við "Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser, dagfest 15. september 2023." herundir útrokningin av ÁKK og ÁKP.

At enda er tað okkara fatan, at avstemmingin millum samanteljingina av ÁKK hjá hvørjum einstøkum kunda og ársroknskapin, umframt aðrar skrásetingar hjá felagnum, eru gjørdar í samsvari við "Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser, dagfest 15. september 2023."

Tórshavn, hin 22. august 2025

Jan Jakobsen
Stjóri

# Váttan frá óheftum grannskoðara viðvíkjandi uppgerð av ÁKK og ÁKP

**Til leiðsluna í P/F Tryggingarfelagnum LÍV**

**Niðurstøða**

Vit hava grannskoðað kostnaðarroknskapin, sum fevnir um "nýttan hátt" fyri uppgerð, avstemmingartalvu (og notur), harundir útrokning og sundurlutan av kostnaðum í sambandi við uppgerð av ÁKK (árligir kostnaðir í krónum) og ÁKP (árligir kostnaðir í prosentum) fyri P/F Tryggingarfelagið LÍV fyri roknskaparárið 2024.

Kostnaðarroknskapurin er gjørdur samsvarandi "nýttan hátt" fyri uppgerð og "Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser", dagfest 15.09.2023.

Kostnaðarroknskapurin er dagfestur tann 22. august 2025. Avstemmingartalvan vísir hesar høvuðspostar:

| | Kr. |
|---|---:|
| Samanteljing av ÁKK til kundarnar (Postur 1) | 59.329.037 |
| Kostnaðir í alt (Postur 18) | 59.329.037 |
| Munur millum Post 1 og Post 18 | 0 |

Tað er okkara fatan, at kostnaðarroknskapurin í øllum týðandi lutum er gjørdur samsvarandi "Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser", dagfest 15.09.2023.

**Grundarlag fyri okkara niðurstøðu**

Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum fyri grannskoðan og eyka krøvum, sum eru galdandi í Føroyum, umframt "Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser", dagfest 15.09.2023.

Okkara ábyrgd sambært hesum standardum og krøvum er nærri lýst í hesi váttan í pettinum "Ábyrgd grannskoðarans fyri grannskoðanini av kostnaðarroknskapinum" niðanfyri. Tað er okkara fatan, at tey grannskoðaraprógv, vit hava fingið, eru nøktandi og egnað at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Óheftni**

Vit eru óheftir av fyritøkuni samsvarandi leiðreglum fyri etiskan atburð hjá grannskoðarum í International Ethics Standards Board for Accountants (IESBA Code) umframt teimum eyka

krøvum, sum eru galdandi í Føroyum, eins og vit halda okkara etisku skyldur samsvarandi krøvum og IESBA Code.

### Áherðsla á viðurskifti í kostnaðarroknskapinum

Vit skulu gera vart við, at býtið av posti 2 "Umsitingar- og nýtekningarkostnaðir sbr. rakstrarroknskapinum" er merkt av serligum viðurskiftum. Miðalrentutryggingar (GR) hava í 2024 fingið eina samsýning frá Marknaðarrentutryggingum (MR) áljóðandi 5,7 m.kr. fyri tíðarskeiðið 1.12.2012 til 31.12.2024. Hetta merkir býtið av umsitingarkostnaði millum MR og GR, og við hesi javning verða umsitingarkostnaðirnir fyri 2024 positivir (inntøka) fyri GR og "ikki viðkomandi avtalur" og samsvarandi hægri fyri MR. Vit vísa til umrøðu felagsins av hesum á síðu 4 í talvuni til post 2.

Okkara niðurstøða er ikki tillagað í sambandi við hesi viðurskifti.

### Áherðsla á viðurskifti í kostnaðarroknskapinum – nýttur háttur

Vit vísa til nýttan hátt fyri uppgerð av ÁKK og ÁKP. Kostnaðarroknskapurin er gjørdur við tí fyri eyga at vísa kundum felagsins hvørjir kostnaðir verða rindaðir fyri eftirlønarskipanirnar hjá kundunum. Uppgerðin fevnir um samanteljing av kostnaðum, sum kundarnir rinda, svarandi til teir samlaðu kostnaðirnar, sum kundarnir rinda felagnum. Av hesi orsøk kann kostnaðarroknskapurin vera óegnaður at nýta til onnur endamál.

Okkara niðurstøða er ikki tillagað í sambandi við hesi viðurskifti.

### Áherðsla á viðurskifti viðvíkjandi grannskoðanini – ÁKK/ÁKP

Grannskoðanin av ÁKK/ÁKP hevur fevnt um eina samanbering av samanteljingini av kostnaðum í posti 1a í avstemmingartalvuni við teir samlaðu kostnaðirnar, sum eru við í uppgerðini av ÁKK/ÁKP til kundarnar (limirnar). Uppgerðin av ÁKK/ÁKP til teir einstøku kundarnar er ikki fevnd av okkara váttan.

Okkara niðurstøða er ikki tillagað í sambandi við hesi viðurskifti.

### Ábyrgd leiðslunnar av kostnaðarroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgd av at gera kostnaðarroknskapin í samsvari við "nýttan hátt" fyri uppgerð umframt og "Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser", dagfest 15.09.2023.

Leiðslan hevur harumframt ábyrgd av tí innanhýsis eftirliti, sum leiðslan metir vera neyðugt fyri at gera kostnaðarroknskapin uttan týðandi feilupplýsingar, uttan mun til, um hetta skyldast sviki ella feilum.

### Ábyrgd grannskoðarans fyri grannskoðanini av kostnaðarroknskapinum

Tað er okkara mál at fáa høga vissu fyri, um kostnaðarroknskapurin sum heild er uttan týðandi feilupplýsingar, uttan mun til, um hetta skyldast sviki ella feilum, og at geva eina váttan við eini

niðurstøðu. Høg vissa er eitt høgt støði av vissu, men er ikki nøkur trygd fyri, at ein grannskoðan, sum verður gjørd samsvarandi altjóða standardum fyri grannskoðan og eyka krøvum, sum eru galdandi í Føroyum, umframt "Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser", dagfest 15.09.2023, altíð staðfestir týðandi feilupplýsingar, tá slíkar eru til staðar.

Feilupplýsingar kunnu íkoma sum avleiðingar av sviki ella feilum og kunnu roknast sum týðandi, um tað sannlíkt kann væntast, at teir hvør sær ella saman hava ávirkan á fíggjarligar avgerðir, sum brúkari tekur við støði í kostnaðarroknskapinum.

Sum liður í grannskoðan, sum verður gjørd eftir altjóða standardum fyri grannskoðan og eyka krøvum, sum eru galdandi í Føroyum, umframt "Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser", dagfest 15.09.2023, gera vit yrkisligar metingar og halda yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini, har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta vit váðar fyri týðandi feilupplýsingum í kostnaðarroknskapinum uttan mun til, um hetta stendst av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiði, sum hesir váðar krevja umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi og egnað at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi feilupplýsingar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi feilupplýsingar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella at við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina av innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til, um tann háttur, sum leiðslan hevur nýtt og lýst í pettinum "Nýttur háttur fyri uppgerð av ÁKK og ÁKP", er hóskandi og um tær metingar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur lýst og nýtt, eru rímiligar.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið fyri ætlaðu grannskoðanina og nær grannskoðað verður og eisini um týðandi avdúkingar, harundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit hava eyðmerkt undir grannskoðanini.

Tórshavn, tann 22. august 2025

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

Hans Laksá
statsaut. revisor